# Bleytu virðiði frammum

JÓNA
MORTENSEN



Tórshavnar Býráð gjørdi herfyri eina nøgdsemiskanning fyri at vita hví tey ungu sum fór uttanlanda at lesa, ikki fluttu heim aftur á klettarnar at búgva.

Tað eru allarhelst fleiri orsøkir til at tey ungu ikki koma aftur. Eg haldi eisini at um tú hevur møguleikan fyri at samanlíkna við hvat ein hevur og hvat ein fær, er freistingin rættiliga stór til at blíva verðandi uttanlanda. Um ein hugsar um at seta búgv í Føroyum, eru bíðilistarnar til grundstykki metur langir og prísirnir himmalhøgir. Longu har er ein stór forðing. Um ein hevur eitt barn ella børn við serligum tørvi, ja so er okkara land ikki tað besta at búgva í, tí her fært tú ikki nógva hjálp. Eg veit væl at akkurát hettar ikki er eitt Býráðsmál, men allíkavæl. Hevur tú so eitt sjúkt barn ella hevur tú sjálv/ur eina sjúku, ja so er eisini rættiliga torført at búgva í Føroyum.

Ikki so at skilja, eg elski at búgva í Føroyum. Men eg havi so sanniliga roynt hvat tað er at hava eitt barn við serligum tørvi og havi eisini verið líka við at pakka saman og flutt til Danmarkar, har hjálp er at heinta. Ikki tí at Danmark bara er gott. Men har eru betri møguleikar báði fyri barnafamiliur og hjá eldri fólki. Tey fáa meir hjálp. Eg haldi at vit mugu raðfesta tey bleytu virðini frammum. Tey bleytu virðini eru í mínari verð eisini tað at fáa ein bústað, eisini at hava eitt gott heilsuverk og eitt gott skúlaverk. Tey gomlu skulu/mugu hava tað gott. Um familian velur at hava eitt eldri fólk búgvandi heima, sum krevur pleygu, skulu tey hava ta hjálp tey hava brúk fyri. Tað eigur heldur ikki at vera so at tey eldru/gomlu skulu berjast fyri at fáa heimahjálp, tað hoyrir ongastaðni heima. Eisini mugu vit arbeiða framm ímóti at børn við serligum tørvi (og so er tað líka mikið hvat tørvurin er) skulu kunna fáa ta hjálp sum er fyri neyðini í Føroyum. So mítt boð uppá at fólk skal tíma at flyta aftur til Føroya er, at tey bleytu virðini verða raðfest frammum, tað fer av sær sjálvum at skapa trivna

# Klaksvíksballið liðugt – rokningin til Havnar

HEÐIN
MORTENSEN
borgarstjóri



Skal rokningin til Havnar fyri liðna Klaksvíksballið, sum Dimmalætting hevur skrivað um 3. og 22. oktober 2008?

Lat meg fyrst takka fyri flotta ballið í Klaksvík, tað var eitt stak hugnaligt kvøld.

Eg helt meg við hetta høvið hava givið gávu vegna okkum øll í Tórshavnar kommunu. Tí eri eg ikki sørt skakkur av grein í Dimmu í gjár um alneyðuga javning, nú Klaksvíkar kommuna staðiliga biður um kommunala útjavning úr miðstaðarøkinum.

At rakstur og íløgur hava ein prís, sum skal gjaldast, tað átti mín góði samstarvsfelagi Steinbjørn O. Jacobsen at vitað. Hetta sama hava Eyðgunn Samuelsen og Gunnvá við Keldu vísiliga víst á.

Eftir at hava lisið vælskrivaðu, men skakandi greinina hjá Árna Gregersen í Dimmu í gjár, kenni eg meg noyddan so staðiliga at vísa aftur, at vit í Tórshavnar kommunu vilja rinda rokningina fyri Klaksvíkar kommunu.

# Er "fejring" blivið – at drekka seg fullan?

TORLEIF
JOHANNESEN
Nes



Til lukku við føroyameistaraheitinum í Formula deildini í fótbólti EB/Streymur!

Tað var stuttligt og hugaligt, at tit blivu meistarar, ja, greipuvinnarar í ár.

Tað var stuttligt at síggja í sjónvarpinum, hvussu spent fólk vóru, og hvussu tað lætnaði fyri ondini og fyri hjartanum við, tá gullið gjørdist veruleiki.

Mitt í øllum stemninginum og gleðini, sum vit fleiri blivu eitt sindur smittaði av, bleiv eg keddur. Tá sjónvarpsmaðurin spyr ein av spælarunum, ein gull og greipuvinnara í ovastu fótbóltsdeild í Føroyum, sum eru fyrimyndir fyri hundratals børn og ungdómar, hvussu tit fara at "fejra" hetta, svarar hann: "Eg giti, við at drekka okkum fullar!"

Um viðkomandi veruliga meinti tað, hann segði, ella bara slongdi tað út, veit eg ikki.

Í øllum førum var tað ein sera keðiligur og skakandi boðskapur.

Álvara tos, er "fejring" blivið tað sama sum at drekka seg fullan, og so í "topp-ítróttarhøpi"? Vónandi "umboðar" hann ikki hópin av føroyskum ítróttarfólki, tí so er støðan álvarsom.

Eg hugsi tað var fyrr í ár, at ein av okkara bestu súkklarum var frammi í fjølmiðlunum og ávaraði móti tí vánaligu fyrimynd nógv av okkara bestu og kendastu ítróttarfólkum vóru. Í tí samrøðuni nevndi hann beinleiðis rúsdrekka.

Tí skal eisini mín vinarliga og álvarsama áminning til okkara fittu og dugnaligu ítróttarfólk verða:

"Verið heiðurligar, góðar og edrúiligar fyrimyndir fyri børn og ung – ja, fyri alt Føroya fólk"

Ítróttur og rúsdrekka hoyra ikki saman.

Við avhalds- og Blá Kross kvøðu.

# Íróttarhøllin á Argjum er ikki raðfest av samgonguni hesumegin til 2014

SJÚRÐUR
OLSEN
Býráðslimur



Mánakvøldið bleiv fimm ára íløguætlanin hjá samgonguni framløgd. Ikki ein króna er sett av til nakra ítróttarhøll í býnum hesumegin ár 2014. Løgi, tí samgongan hevur lovað bæði at dagføra ítróttarhøllina á Hálsi og at byggja nýggja ítróttarhøll á Argjum.

Eg haldi, at máti skal vera við at halda fólk fyri gjøldur. Byggifyritøkan, ið vann lisitasjónina, sum var um høllina á Hálsi, hevur ikki so frætt sum fingið eitt svar frá býráðnum, sjálvt um lisitasjónin var fyri fleiri mánaðum síðani.

Argjafólk hava fingið lovað ítróttarhøll í fleiri ár, men tað lyftið ætlar meirilutin ikki at halda, ikki tey fyrstu fimm árini í hvørt fall. Sjálvur borgarstjórin rópti upp á eini argjaveitslu fyri nøkrum árum síðani, at nú skuldu argjafólk fáa eina ítróttarhøll, men herúti verður bíðað enn.

**Neistahøllin í vesturbýnum**
Neistin fekk eitt grundstykki frá seinastu samgongu úti við Landavegin til at byggja eina ítróttarhøll á. Teir hava latið tekningar inn og søkt byggiloyvi fyri nógvum mánaðum síðani, men eisini tað málið hevur verandi samgonga sútlað við eini ætlan um at taka stykkið aftur frá teimum. Býráðið hevur eisini samtykt at játta Neistanum stuðul til høllina.

Annars haldi eg, at vesturbýurin er afturúrsigldur, tá talan er um hallir, vallir og annað, ið kundi verið gjørt fyri ungdómin og trivnaðin í tí partinum av býnum.

Alt hetta nøl og drál kunnu vit broyta við at velja ein sterkan fólkafokk í býráðið. Verði eg valdur, vil eg arbeiða fyri at fremja hesi mál.

# Opið bræv til Kaj Leo Johannesen, løgmann og Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharra

HØGNI HOYDAL
Formaður í Tjóðveldi



**Skulu Edmund Joensen og Sambandsflokkurin avreiða føroysk áhugamál og fólkarræði – og undirgrava okkara altjóða samráðingarstøðu?**

Edmund Joensen og Sambandsflokkurin hava kallað til tíðindafundar í morgun, har boðað verður frá, at teir hava fundast við ein ES-kommisér um føroyskan limaskap í ES sum partur av Danmark. Edmund Joensen er næstformaður í Uttanlandsnevnd Løgtingsins fyri samgonguna.

Sum formaður í størsta flokki á tingi og limur í Uttanlandsnevnd Løgtingsins fari eg hervið at krevja, at løgmaður og uttanríkisráðharrin beinanvegin – í dag – svara hesum spurningum alment og taka neyðugar avleiðingar.

Hava vit tveir løgmenn og tveir uttanríkisráðharrar í Føroyum? Hava vit Kaj Leo Johannesen og Jørgin Niclasen øðrumegin – og so Edmund Joensen og Sambandsflokkin hinumegin?

Hvør hevur givið Edmundi Joensen og Sambandsflokkinum heimild at spæla hazard við framtíðini hjá føroyska fólkinum við at samskifta við ES-kommiserar um føroyskan ES-limaskap og at senda almennar fráboðanir út um hetta til umheimin – og harvið at undirgrava tær ætlanir og avgerðir, sum Uttanríkisráðið og Uttanlandsnevnd Løgtingsins hava lagt sambært demokratiskum mannagongdum?

Hvørji stig fara løgmaður og Uttanríkisráðharrin at taka til tess at steðga hesum og bøta tann skaða og ta undirgraving av arbeiðinum hjá Uttanríkisráðnum og Føroya Løgtingi, sum Edmund Joensen og Sambandsflokkurin longu hava framt við sínum fráboðanum, sum sjálvsagt verða lisnar av øllum teimum, vit skulu samráðast við?

**Grundgevingar:**

Í sjey mánaðir hava vit stríðst fyri at byggja upp føroyska Uttanríkisráðið. Dugnalig fólk hava leingi starvast bæði heima og á okkara sendistovum við at byggja upp okkara umdømi og førleikar at samráðast við onnur lond og altjóða felagskapir. Nýggj fólk eru sett við, og vit hava gjørt greiðar ætlanir fyri, hvussu vit røkja føroysk áhugamál í altjóða samráðingum.

Uttanríkisráðharrin hevur verið á almennum vitjanum og fundum hjá sínum starvsfeløgum í Íslandi, Noregi, Grønlandi, Liechtenstein, Skotlandi og Isle of Man. Vit hava havt fundir við bretskar myndugleikar, ES-myndugleikar og onnur um tey greiðu mál, vit hava sett okkum fyri.

**EFTA-málið – eitt úrslit av drúgvum arbeiði**
Vit fingu í juli mánaða EFTA at seta niður eina serfrøðinganevnd at viðgera møguleikan fyri nýggjum limum, tí Ísland, Noreg og Liechtenstein stuðlaðu hesum eftir okkara rundferðir. Og vit hava nýtt stóra orku at fáa parlamentarisku nevndina hjá EFTA til Føroya – sum avtalað varð longu tíðliga í summar.

**Semja um at halda fram**
Tí vóru undirritaði og Tjóðveldi fegin um, at nýggja samgongan og nýggi uttanríkisráðharrin hesar seinastu vikurnar hava hildið fram við hesum arbeiði og hava profilerað seg dúgliga við tí, sum lá klárt og fyrireikað.

Meðan Tjóðveldi umsat uttanríkismál sóu vit tó støðugt, at Sambandsflokkurin og Edmund Joensen úteftir niðurgjørdu arbeiði Uttanríkisráðsins og sendu øvutar boðskapir og tíðindaskriv út. Hetta var ómetaliga skaðiligt fyri føroysk áhugamál, tí hetta verður lisið og endurgivið gjøgnum sendistovur og altjóða stovnar og felagsskapir, sum fylgja neyvt við.

Men síðani sambandsflokkurin fekk løgmanssessin, hevur løgmaður stuðlað øllum tí, sum CHE-samgongan hevði sett í gongd í uttanríkismálum. Hetta er ein sera stór styrki, sum kann geva úrslit frameftir – og Uttanlandsnevndin hevur verið samd.

**Næstformaðurin møtti ikki upp – og undirgrevur nú vilja løgtingsins**
Men Edmund Joensen, sum er umboð sambandsfloksins í Uttanlandsnevndini og fólkatingsmaður, møtti ikki á fundi við EFTA-nevndina. Og nú heldur hann fram at undirgrava tað, sum er vunnið og kann vinnast.

Tá ið Edmund Joensen og Sambandsflokkurin nú kalla til tíðindafundar og senda almenn skriv út um samráðingar við ES-kommiser um at lima Føroyar inn í ES gjøgnum Danmark, so er talan um at seta alt Løgtingið og Uttanríkisráðið til viks, sum hava ábyrgd av at umboða føroysku tjóðina úteftir.

Ongin lond ella altjóða felagsskapir kunnu taka Føroyar í álvara, tá slíkt fer fram, og hetta niðurbrýtur møguleikarnar hjá føroyingum at vinna okkum avtalur, ið mynda eina nýggja framtíð hjá okkara landi.

Hetta er ein beinleiðis avreiðing av føroyskum rættindum og fólkaræði.

Og tí má hetta sjálvsagt fáa avleiðingar beinanvegin.